## Ronaldo heldur fram í United

Tað hevur leingi verið upp á tal, at Cristiano Ronaldo í komandi kappingarári skal spæla við Real Madrid. Men portugisin ger nú enda á mongu søgunum. – Sir Alex Ferguson lurtaði eftir mær, eg lurtaði eftir honum, og vit samdust um, at frægast er, um eg haldi fram á Old Trafford. Eg kann her við staðfesta, at eg spæli við Manchester United í komandi kappingarári. Eg eri til reiðar at stríðast, sigur Cristiano Ronaldo, sambært porgugisiska blaðnum Publico.



## Leirvík fram um útlandið

Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, segði við Rás 2 á middegi, at útlendsk feløg hava sýnt Andreasi Lava Olsen áhuga, men at leirvíkingur ikki hevur verið sinnaður at roynt eydnuna. – Hann valdi at spæla við barndómsfelagnum LÍF heldur. Eg vóni, at hann verður ein av stuðulsleikarunum á landsliðnum komandi árini, sigur Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, í stuttari viðmerking við Rás 2.

KÍ – B68 0-1 (0-0):

# Festival girið var ikki at finna

KÍ

B68

**Klaksvíkingar eru nú hóttir í botninum, eftir at B68 við væl skipaðum avriki fekk meiri luft, samstundis sum teir settu kílar í festival hýrin í Klaksvík**



*Nógv hevur verið sagt og skrivað um Rógva Jacobsen, sum kom til KÍ í steðginum. Hann var tó væl ansaður í gjár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Summarfestivalurin er á skránni. Fyrstu tónarnir ljóða í kvøld, og alla síðstu viku og fram til í dag hevur verið stórt fyrireikingar-virksemi í Klaksvík.

Í gjárkvøldið skuldi botnur leggjast í góða hýrin millum norðoyingar, tá ið KÍ hevði vitjan av B68. Men í staðin fyri at trý stig vórðu sett á soltnu kontina, vóru klaksvíkingar blíðir, og B68 takkaði fyri. Toftamenn vunnu 1-0, og harvið eru fyritreytirnar hjá hesum báðum liðunum, sum alt kappingarárið hava verið partur av niðara endanum av kappingini, broyttar soleiðis, at nú er KÍ saman við B68 bara trý stig frammanfyri tey bæði aftastu.

Einasti málskjúttin var blaðungi og sera evnaríki Jóan Símun Edmundsson, sum fram ímóti dystarenda eftir frísparksinnlegg frá Jann Inga Petersen við høvdinum stýrdi bóltin í málið. Fagnaðurin var stórur millum gestirnar, og heimafólkið fór til hús við tí staðfesting, at talan eftir øllum at døma verður um rættuliga strevið fótbólts-heyst, hóast navnaskiltini kundu boðað frá, at KÍ skuldi átt gott fótbóltslið.

Í summar er Rógvi Jacobsen lagstur afturat KÍ liðnum. Hetta hevur tað verið tosað og skrivað nógv um. Ikki so nógv hóvasták hevur verið gjørt burturúr, at B68 hevur fingið tríggjar nýggjar spælarar. Ein teirra, Pól Jóhannes Justinussen, var ígjárkvøldið í miðverjuni saman við Jóhan Dávurin Højgaard. Setningurin hjá hesum báðum var at taka sær av Rodrigo og Rógva Jacobsen. Tað megnaðu teir meistarliga væl. Teir plaseraðu seg væl, dugdu væl at meta um, nær teir skuldu bíða, og nær teir skuldu leypa á, og í luftkrígnum vóru teir eins stinnir sum toppskjúttin á landsliðnum.

Í 1. hálvleiki hevði heimaliðið bóltin nógv størsta partin av tíðini. Men málmøguleikarnir vóru fáir og smáir. Konseptið var at fáa breidd og dýpd í spælið, eitt nú við diagonalsendingum aftur um bakverjarnar. Men tað eydnaðist ikki serliga væl. Joe Zewe í høgru og Heðin á Lakjuni í vinstru megnaðu bara hendinga ferðina við ferð at bróta ígjøgnum fyri síðani at leggja innfyri.

Orsøkirnar til at tað ikki eydnaðist, sum tað var ætlað, vóru fleiri. Ein var, at ferðin, neyvleikin og tyngdin í uppspælinum ikki var, sum hon skuldi havt verið, um tað skuldi eydnast at taga tøttu toftaverjuna sundur. Ov nógvar sendingar vóru ov lítið neyvar, og tað bar við sær, at tað var lætt hjá mótstøðuliðnum á egnari hálvu at seta fólkið soleiðis, sum tað skuldi setast.

Ein onnur orsøk – og hon var ikki minni eyðsýnd – var tann, at B68 hevði lúrt taktikkin av og avgreiddi sín setning meistarliga. Arnbjørn Danielsen og Øssur Hansen hava so nógvar royndir sum fáir. Teir vístu væl, hvussu tað skuldi tettast í borðunum, og teir vistu, hvussu teir skuldu bera seg at, tá ið teir reyðu høvdu fingið fatur á bóltinum.

Jann Ingi Petersen og Ndende stóðu seg heilt væl í sentrala miðvallar stríðnum, og fleiri ferðir vístu toftamenn tenn í snaráløpum. KÍ hevði bóltin mest í 1. hálvleiki, men talan var um klárt besta málmøguleikan, tá ið Ndende, sum var blankur mitt fyri málinum, eftir innlegg úr vinstru frá Keita, við høvdinum stýrdi bóltin upp um tvørtræið.

Í 2. hálvleiki vísti B68 meiri mót og áræði. Tað tóktist sum um, at 1. hálvleikur hevði sannført teir um, at tað kundi bera til at fáa fulla úrtøku. Alt bendi á málleysan javnleik, eftir at Brian Andrésen í 2. hálvleiki hevði misnýtt orduligan direktør, men so var tað, at toppskjúttin á U19 landsliðnum tryggjaði teimum øll stigini og samstundis legði dempara á festivalhugin í Klaksvík!

## Nýggj uppskrift á Toftum

B68 miðvallarin Jann Ingi Petersen var saman við liðfeløgunum ovurfegin eftir fullu úrtøkuna í Klaksvík:

-Vit ætlaðu okkum øll stigini, men vit høvdu verið nøgdir við eitt stig. Í fleiri av undanfarnu ferðunum hava vit spælt væl, uttan at vit hava vunnið stig. Hesa ferð var taktikkurin at lata teir hava bóltin og so bíða eftir møguleikanum at fara í kontraálop. Tað gjørdu vit serliga í 1. Hálvleiki, men eisini eftir steðgin. Vit høvdu tríggjar teir størstu møguleikarnar, og tí var tað ikki við síðuna av, at tað vóru vit, sum fingu einsamalla málið, heldur Jann Ingi Petersen, sum nú er spentur til 17. umfar:

-Vit skulu spæla í Fuglafirði, og tað verður ikki minni avgerandi avbjóðing. Eftir sigurin í Klaksvík eru vit javnir við KÍ í stigum. Um vit vinna í Fuglafirði, so verða vit aftur javnir við ÍF. Tað verður spennandi, men nú fegnast vit um, at tað hilnaðist so væl í Klaksvík, sigur Jann Ingi Petersen, sum hevur hug at rósa nýggju miðverjuni fyri frágera gott avrik.

## Kendu ikki vitjunartíðina

KÍ venjarin, Eyðun Klakstein, var ógvuliga vónbrotin eftir heimatapið ímóti B68. Sum 2. hálvleikur leið kendist møguleikin fyri at fáa mál og harvið at vinna at kámast í góða summarveðrinum.

-Vit kendu ikki okkara vitjunartíð. Okkara løgdu bragdliga fyri, og fyrsta korterið vóru vit fleiri ferðir framvið, men oftast vóru síðstu sendingarnar ikki nóg neyvar, og harvið vóru uppløgdu møguleikarnir fáir. Fleiri spælarar hava verið burturi frá venjing í fleiri vikur, og tað sást, hóast tað ikki skal vera nøkur umbering, tí ivaleyst er støðan tann sama í hinum feløgunum, sigur Eyðu Klakstein, sum rósar B68:

-Teir vóru ógvuliga tilvitaðir um, hvussu teir skuldu spæla. Fyrstu løtuna høvdu teir trupulleikar, men longu seinna partin av 1. hálvleiki høvdu teir fótað sær, og í síðsta enda var tað toppskjúttin á U19 landsliðnum og ikki á a-landsliðnum, sum átti avgerandi stútaran.

Tíggju minuttir undan steðginum noyddist Ovi Nysted at fara av vøllinum. Hann hevði fingið snudd í ryggin og varð lagdur inn á sjúkrahúsið í Klaksvík.